**MENTAMÁLASTÝRIÐ**
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

**Dagur:** 14. februar 2001
**Máltal:** 44202/2/010896/2

# Handilsskúlin

*Lærugreinakunngerð* *Februar 2001*

## Danskt A

### *Endamálið*

**1.** Endamálið er, at næmingarnir menna:
a) hug og evni at lesa fagrar bókmentir og onnur tekstasløg
b) førleika sín at greina, tulka og meta um
c) sína fatan av bókmentasøguligu, siðsøguligu og søguligu gongdini í Danmark og í øðrum londum
d) sítt málsliga, fagurfrøðiliga og søguliga medvit, sína sjálvsfatan, síni ímyndingar-evni og evni til at taka dagar ímillum og
e) evni síni at nýta danskt mál skrivliga og munnliga.

### *Undirvísingin*

**2.1** Høvuðstátturin í lærugreinini er danskir, norðurlendskir og aðrir tekstir. Tekstirnir skulu vera fjølbroyttir í tíð, sniði og innihaldi. Bæði fagrar bókmentir og yrkisbókmentir skulu vera umboðaðar. Undirvísingin fevnir eisini um ein skrivligan tátt. Næmingarnir skulu skriva ymisk tekstasløg, t.d. vanligar stílar, fagrar bókmentir, fjølmiðlatekstir, umsóknir og handilsbrøv.

**2.2** Við tekst skilst víðkaða teksthugtakið, t.e., at alt lisið, hoyrt og sæð er at skilja sum tekstur.

**2.3** Í vavi fevnir tekstalesingin um í minsta lagi 250 normalsíður, umframt 4 høvuðsverk[1] og 2 sjálvlisin verk. Hvør pultstími, sum burturav er nýttur til audiovisuella undirvísing, kann umroknast til 5 normalsíður í lesipensum, tó í mesta lagi 40 normalsíður.

**2.4** Tekstalesturin fevnir um søguligan lestur og sjálvvaldar lestrartættir.

**2.5** Undirvísingin verður løgd soleiðis til rættis, at høvi býðst til tvørfakligt samstarv.

**2.6** Undirvísingin í donskum í hvørjum flokki sær eigur at verða samskipað við undirvísingina í føroyskum.

[1] Eitt høvuðsverk er ein skaldsøga, eitt stuttsøgusavn, eitt yrkingasavn, ein sjónleikur ella ein filmur. Eitt verk kann eisini vera eitt tekstasavn við tekstum eftir sama rithøvund, tekstasavn frá ávísum tíðarskeiði ella tekstasavn við sama evni og sama ella ymiskum tekstasløgum, eisini yrkisbókmentum. Eitt verk, samansett av ymiskum tekstum, skal í minsta lagi vera 80 normalsíður. Verk, sett saman av yrkingum, skal í minsta lagi vera 25 normalsíður.


MENTAMÁLASTÝRIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMS@MMS.FO

*Innihaldið í undirvísingini*

**3.1** Karmar fyri tekstalestri:
1) *Søguligur lestur*: Søguligi lesturin fevnir um tekstir frá elstu døgum til okkara tíð. Søguligi lesturin skal gera næmingarnar betur førar fyri at uppliva, skilja og fáa eina heildarfatan av tekstum. Søguligi lesturin er settur saman av:
a) tekstum úr nýggjastu tíðini
b) tekstum úr ávísum tíðarskeiðum
c) søguligum tekstalestri annars
Við nýggjastu tíðina skilst seinastu 40 árini. Tíðarskeiðið, ið lisið verður, skal liggja framman undan seinastu 40 árunum. Søguligi lesturin annars kann leggjast til rættis antin sum evnislestur, har eitt evni frá elstu døgum fram til í dag verður viðgjørt, ella við at lesa brot úr søguligu gongdini. Hesi tíðarskeið verða vald og løgd soleiðis til rættis, at bæði nýskapan og framhald í bókmentunum koma týðiliga til sjóndar. Tilsamans skal søguligi lesturin og skipan hansara geva næmingunum vitan um høvuðsrákini í donskum og altjóða bókmentum og mentanarlívi sum heild.
2) *Lestrartættir*: Arbeitt verður eisini við nøkrum avmarkaðum evnum innan fakøkið, ið næmingarnir velja í samráð við læraran. Hesi kunnu antin taka støði í øðrum arbeiði hjá flokkinum í lærugreinini, ella í samstarvi við aðrar lærugreinir. Evnið samskifti, t.d. sølulýsingar ella fjølmiðlatekstir, skal vera umboðað.

**3.2** Tekstalesturin fevnir um:
a) *Høvuðsverk*. Sum ein partur av tekstalestrinum verða lisin í minsta lagi 4 høvuðsverk. Í minsta lagi eitt av høvuðsverkunum skal knýtast at tíðarskeiðslestrinum.
b) *Ískoytislestur*. Hvør sær ella í smærri bólkum skulu næmingarnir lesa 2 verk. Næmingarnir velja verkini, og lærarin skal góðkenna tey. Ein skrivlig uppgáva verður gjørd um annað av verkunum, hitt verður lagt fram í ráðleggingartímanum.
c) *Aðrar norðurlendskar bókmentir*. Í sambandi við tekstalesturin skulu svenskir og norskir tekstir lesast á upprunamáli. Bókmentir úr øðrum londum í umseting kunnu lesast á øllum økjum. Lesast skulu í minsta lagi 25 normalsíður á svenskum og í minsta lagi 25 normalsíður á norskum.

*Mál*

**4.1** Í undirvísingini er málið ein natúrligur partur av viðgerðini av tekstum. Málslig fyribrigdi og málnýtsla sum heild verða viðgjørd.

**4.2** Munnligi tátturin skal menna málførleika næminganna, m.a. við samrøðu og upplestri.

**4.3** Skrivligi tátturin skal fáa næmingarnar at royna og menna seg í ymsari skriving, frá tí yrkiskenda til tað listarliga. Skrivaðar verða 14 uppgávur (íroknað uppgávur til royndir, próvtøkur og viðgerð av sjálvlisnum verki) til støddar sum próvtøku-uppgávurnar.

**5.** Teld og kunningartøkni er partur av undirvísingini.

*Høvuðsuppgávan*

**6.1** Í høvuðsuppgávuni skal næmingurin seta seg inn í eitt sjálvvalt evni og sýna evni til sjálvstøðugt at bera øðrum tað innlit, hann hevur ognað sær.

**6.2** Evnið í uppgávuni og arbeiðshátturin skal hava støði í lærugreinini donskum, men evni og sjónarmið úr øðrum lærugreinum kunnu takast uppí. Evnið kann vera framhald av einum evni, sum er gjøgnumgingið í flokkinum, men tær brúktu bókmentirnar mugu ikki frammanundan hava verið nýttar í undirvísingini.

**6.3** Dømingin verður grundað á eina heildarmeting av, hvussu næmingurin hevur greitt frá týdningarmestu táttunum í valda evninum, og hvussu uppgávusvarið verður skipað, viðgjørt og lagt fram.

*Próvtøkan*

**7.1** Hildin verður ein munnlig og ein skrivlig próvtøka.

**7.2** Munnliga próvtøkan fevnir um próvhoyring í einum ólisnum teksti. Fyrireikingartíðin er umleið 60 minuttir, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 2 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**7.3** Næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, geva upp til próvtøkuna umleið 120 normalsíður av lesipensum, umframt 1 verk. Próvtakarin verður próvhoyrdur í einum ólisnum teksti, sum eigur at hava tilknýti til lisnu tekstirnar. Próvhoyrarin velur ólisna tekstin, ið kann vera settur saman av fleiri tekstum ella tekstabrotum, tó í mesta lagi 8 normalsíður til longdar. Rithøvundur og útgávuár skulu vera tilskilað, og um neyðugt orðafrágreiðingar. Er talan um brot úr longri teksti, skal stuttur samandráttur vera. Tað, ið gjøgnumgingið er í undirvísingini, skal í síni breidd ganga aftur í próvtøkuspurningunum, herundir eisini svenskir og norskir tekstir. Próvtøkupensum skal vera javnt umboðað í próvtøkutekstunum.

**7.4** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**7.5** Við sær til fyrireikingar fær próvtakarin eitt reint og væl prentað eintak av ólisna tekstinum. Próvhoyrarin kann orða vegleiðandi spurningar til tekstirnar. Í fyrireikingarhølinum er næminginum loyvt at hava hjá sær egnar uppskriftir, allar bøkur og alt tilfar, sum hevur verið brúkt í undirvísingini. Í fyrireikingarhølinum skulu hesar orðabøkur vera til taks: allar føroyskar-danskar og danskar-føroyskar orðabøkur, Nudansk Ordbog, Fremmedordbogen, svensk-donsk orðabók og norsk-donsk orðabók, umframt hóskandi uppslagsbøkur. Undir próvhoyringini kunnu sum stuðul undir framløguni brúkast uppskriftir gjørdar í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplestur telur ikki uppeftir í dømingini.

**7.6** Próvhoyringin tekur støði í einari framløgu hjá próvtakaranum og fer fram sum ein samrøða á donskum millum próvtakara og próvhoyrara. Undir próvhoyringini skal próvtakarin vísa evni síni at greina, tulka og draga fram aðaltættirnar í tekstinum.

Harumframt skal próvtakarin eisini duga at seta tekstin inn í eitt mentanarligt, samfelagsligt ella tíðartangt høpi.

**7.7** Givið verður 1 próvtal. Próvtalið verður givið við støði í eini heildarmeting.

**8.1** Skrivliga uppgávan varir fimm tímar. Próvtakarin kann velja millum fleiri uppgávur, grundaðar á ymiskt tilfar.

**8.2** Allar føroyskar-danskar og danskar-føroyskar orðabøkur, Nudansk Ordbog, Retskrivningsordbogen og Fremmedordbogen, allar í nýggjastu útgávu, skulu vera til taks í próvtøkuhølinum í nóg nógvum eintøkum.

**8.3** Í skrivligu uppgávuni skal próvtakarin vísa evni síni at orða seg greidliga á donskum máli um samansett fyribrigdi. Í dømingini skal dentur leggjast á evni próvtakarans at leggja fram sína hugsan, at próvføra og at leggja tilfarið til rættis.

**8.4** Givið verður 1 próvtal fyri skrivliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í eini heildarmeting.